# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Minningarorð

Ein stillførur og í orðsins besta týdningi mentað sál er farin.

Ólavur Olsen, fyrrverandi stjóri á Grannskoðanardeild landskassans hevur, høgt í árum, lagt árarnar inn.

Hann, ið hetta skrivar, hevði tað privilegium at arbeiða saman við Ólavi í mong ár, hann sum sagt á grannskoðanardeildini og eg á Føroya Gjaldstovu. Serliga vóru tað árini seinra partin í 1980-unum, tá ið samfelagið so líðandi loysnaði í seymingini, og hetta kanska eina mest kom til sjóndar í landskassans meginumsiting, at okkara arbeiði á ávísum økjum varð samanknýtt. Báðir vóru vit tá hvør í sínum lagi engageraðir í arbeiðsbyrðum við sterkum træðrum til løgtingið og landsstýrið.

Vit tosaðu mangan álvarsligt saman niðri á Kongabrúnni.

Altíð var hann tann róligi og sakligi. Hann dugdi fólkasið. Leyp



ikki framav, hóast byrðan óivað í løtum kann hava verið tung í einum so árendum stjórastarvi, sum tað, honum varð litið í hendi.

Og tað rann gott millum okkum báðar. Júst í teimum nevndu árum stóð mangan á; men hann var altíð tann róligi við tí blíðkandi, varliga brosinum á vørrunum hóskandi einum gentlemanni.

Ætlanin við hesum fáu orðum er at veita Ólavi eina seinastu tøkk fyri tað, hann gav frá sær í sínum krevjandi og trupla almenna starvi og at lýsa frið yvir hansara minni.

…….

Tit, sum hava mist, vístu manni, pápa, abba og langabba tykkara eina virðiliga, musikalska jarðarferð. (Trupult beint nú at finna aðra orðføring).

Hann hevði óivað notið løtuna.

Heri Mohr

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæra mamma, vermamma, omma, langomma og olduromma okkara

**Thurid Alvilda Frederikka Abrahamsen**
Fuglafirði

andaðist á Vesturstovu sunnudagin 20. apríl, 95 ára gomul.

Jarðarferðin verður frá Fuglafjarðar kirkju mikudagin kl. 14.

**Børnini**

Tey, ið vilja minnast Thurid, verða biðin um, heldur enn at lata krans, at lata eina peningagávu til Fuglafjarðar kirkju ella Thabor í Fuglafirði. Konta í peningastovnunum.

**Dagurin**
**23. apríl. Georgius**, deyður umleið ár 300. Halgisøgan sigur, at hesin kristni riddarin feldi ein dreka og bjargaði kongsdóttrini har í staðnum. Hann varð seinni tikin av døgum fyri trúar sakir. Dagurin er valdur til almennan skótadag um allan heim. Grikska navnið merkir hann sum dyrkar jørðina.

## Minningarorð um Kurt Hansen

**f. 10. juni 1935 – d. 23. mars 2008**

Páskakvøld 23. mars andaðist Kurt Hansen 72 ára gamal.

Tað vóru tung boð at fáa, tá ið dóttirin Ann ringdi fyri mammu sína og segði, at pápi sín var farin. Ein maður, ið var inni hjá okkum tá, tók soleiðis til: "Tit hava mist ein góðan mann, hann hevur verið trúgvur í sínum arbeiði," og tað mugu vit, ið varða av Skálabúðini, so sanniliga taka undir við – ein trúgvur starvsfelagi ígjøgnum 38 ár er ikki okkara ímillum longur.

Ein hoyrir ofta, at lívið er í pørtum, og kom hesin arbeiðisdagurin at gerast ein stórur partur av lívsskeiði hansara.

Kurt var dani úr Ringsted, var útlærdur innan harraekvipering, og ferðaðist hann í nøkur ár til Føroya sum ferðaseljari við Heika gardinum, sum vóru væl umtóktar. Í tí sambandi hitti hann Kirstin, dóttir Hansinu og Pidda Johannesen, kendur sum Piddi á Sjómansheiminum.

Tá ið tað frættist, at tey ætlaðu sær at giftast, spurdi pápi okkara Kurt, um hann væntaði, at tey blivu í Føroyum, og um so var, um hann kundi hugsað sær eitt starv í Skálabúðini.

Tey giftust í 1971, og fingu tey døturnar Ann og Lis.

Kurt arbeiddi í Skálabúðini, har foreldur okkara, Hanna og Óla Kristian Skála saman við fleiri starvsfólkum, starvaðust, pápi sum stjóri. Ein av starvsfeløgunum hjá Kurt var Jens John Østerø, sáli, ið var handverkari og hevði tá arbeitt í Skálabúðini eftir vanliga arbeiðistíð, men tað var so skjótt, at brúk var fyri honum fulla tíð, og arbeiddu øll væl saman.

Umframt alt tað vanliga arbeiðið,



ið ein handil krevur, fór Kurt m.a. niður á handilsmessu at keypa vørur inn, pyntaði handilsgluggar, sum hann hevði lært til í síni lærutíð, og fall alt honum ógvuliga lætt.

Mest kendur er hann tó frá síni vitan innan gardinyrkið, og sum eitt viðskiftafólk tók til fyri stuttum, at hann dugdi so væl at leiðbeina viðskiftafólk.

Hann fall væl til í Føroyum, dámdi at fara á flot, skera grind upp, seta niður epli, og at hjálpa til inni á Strondum í flettingartíð, dámdi honum eisini sera væl.

Hann var áhugaður í nógvum frítíðarítrivi, spældi badmiton í nógv ár, og arbeiðissamur, sum hann var, kom hann skjótt í fleiri nevndir, m.a. í Tórshavnar Ítróttarráð, Lions og var eisini formaður í Havnar Klubba í nógv ár.

Kurt hevði kanska ikki lagt í at verið róstur, men hann var arbeiðissamur sum fáur, fyrstur til arbeiðis á morgni, ongar sjúkradagar, uttan tá ið hann var sjúkur fyri um leið tveimum árum síðan. Hann var virkin til tað seinasta.

Teir ungu menninir í familjum okkara hava allir hjálpt til í handlinum í styttri og longri tíð, og hava teir alt gott at bera honum.

Tá ið hann fór til gravar sást, at vinirnir vóru nógvir. Dómkirkjan var full av fólki. Sálmarnir vóru føroyskir og danskir. Heri Joensen, prestur, talaði og segði m.a., at hann kendi henda virksama mann úr Lions Club. Hugnaligt var at hoyra Kristiliga Sangkórið syngja "Heima í himli fer ongin at gráta", og tá ið kistan var borin út, varð sungið:

*Det er vemodigt at skilles ad*
*for dem, som gerne vil sammen være,*
*men, Gud ske lov, i vor Herres stad*
*for evig samles de hjertenskære;*
*ja, der er gammen*
*at leve sammen,*
*hvor ja og amen*
*er kærlighed.*

Vit hugsa um tykkum Kirstin, Ann, Lis, Fróða og ommu- og abbabørnini, ið hann var so errin av.

Harrin styrki tykkum í sorgini.

Æra verði minni um Kurt Hansen, »vit sakna teg.«

**Ása, Kári og Marin**



MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin